Løgbiti nr. 13

# Fyrisitingarlógin, innlitslógin og persónsupplýsingarlógin

LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Lógartænastan mai 2020**

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 13**

# Fyrisitingarlógin, innlitslógin og persónsupplýsingarlógin

Í hesum løgbita verða markamót millum tríggjar løgtingslógir, sum allar eru galdandi fyri almennu fyrisitingina, og sum tykjast at regulera somu viðurskifti samstundis, viðgjørd. Allar tríggjar løgtingslógirnar eru horisontalt galdandi. Tað merkir, at tær eru galdandi fyri allar myndugleikar í øllum viðurskiftum innanfyri virkisøkið.

Tað er serliga í tveimum førum, at ivi kann vera um, hvørjar reglur eru galdandi í ítøkiligum førum. Hetta er fyri tað fyrsta í sambandi við víðarilatan (víðarigeving) av persónupplýsingum í almennu fyrisitingini og fyri tað næsta í sambandi við innlit.[i]

**1. Víðarilatan (víðarigeving) av upplýsingum**

*Samanhangurin millum fyrisitingarlóg og persónsupplýsingarlóg*

Fyrisitingarlógin er frá 1993 og er ikki broytt síðani. Í § 27 í fyrisitingarlógini er ein almenn áseting um, nær ein fyrisitingarmyndugleiki kann lata sokallaðar trúnaðarupplýsingar víðari til annan fyrisitingarmyndugleika. Trúnaðarupplýsingar – sum ikki bert fevna um persónupplýsingar, men eisini upplýsingar um løgfrøðiligir persónar o.s.fr. – eru m.a. upplýsingar um ættarslag, trúgv og húðalit, um politisk, felagsskaplig, kynslig og revsiverd viðurskifti eins og upplýsingar um heilsuviðurskifti, stórar almannatrupulleikar og misnýtsla av njótingarevnum og líknandi.

Persónsupplýsingarlógin er galdandi fyri alla viðgerð av persónupplýsingum fyri almennu fyrisitingina, undir hesum eisini tá almennir myndugleikar lata persónupplýsingar víðari til aðrar myndugleikar. Persónsupplýsingarlógin deilir persónupplýsingar upp í tveir bólkar; vanligar persónupplýsingar og viðkvæmar persónupplýsingar. Viðkvæmar persónupplýsingar eru allýstar í § 2, nr. 9 og fevnir hetta í høvuðsheitum um somu upplýsingar, sum í fyrisitingarlógini verða kallaðar trúnaðarupplýsingar.

Í viðgerðarreglunum í kapitul 4 í løgtingslógini er ásett, nær persónupplýsingar kunnu viðgerast og í § 10 er ein serlig áseting um viðgerð, undir hesum víðarigeving, av viðkvomum persónupplýsingum.

Um virkisøkið er í § 3 ásett, at løgtingslógin er galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum fyri privat og fyri tað almenna um viðgerðin er heilt ella lutvíst elektronisk og um persónupplýsingarnar eru ella verða settar í eina skrá, sjálvt um viðgerðin ikki er elektronisk.

Tað kann sostatt tykjast, at fyrisitingarlógin og persónsupplýsingarlógin í hvør sínum lagi regulera spurningin um í hvønn mun ein fyrisitingarmyndugleiki kann lata persónupplýsingar – trúnaðarupplýsingar og viðkvæmar persónupplýsingar – víðari til ein annan fyrisitingarmyndugleika. Ásetingarnar í báðum løgtingslógunum minna um hvørja aðra og í fleiri førum verður úrslitið tað sama, óansæð hvør lóg verður nýtt, men tað kunnu eisini verða føri við ósamsvari.

*§ 27 í fyrisitingarlógini víkir í flestu førum*
Persónsupplýsingarlógin ásetur, nær og undir hvørjum treytum persónupplýsingar kunnu viðgerast, meðan fyrisitingarlógin alment regulerar málsviðgerð í fyrisitingini við serligum atliti til, hvørji rættindi partar í málum hava.

Viðmerkingarnar til persónsupplýsingarlógina frá 2001, sum er tann nýggjara av løgtingslógunum, taka ikki ítøkiliga støðu til, hvussu skal farast fram í teimum førum, tá tað kann verða ivi um, hvørt fyrisitingarlógin ella persónsupplýsingarlógin skal nýtast.

Í viðmerkingunum er tó greitt frá, at endamálið við løgtingslógini er, at tryggja eina tíðarhóskandi lóggávu, sum er einføld at umsita og greið at nýta umframt at tryggja eina samlaða lóggávu, sum fevnir um alla viðgerð av persónupplýsingum, óansæð um viðgerðin fer fram í tí privata ella almenna geiranum.

Hetta hevur við sær, at um viðgerð av persónupplýsingum er innanfyri virkisøkið í § 3 í persónsupplýsingarlógini, skal viðgerðin lúka treytirnar í løgtingslógini. Hetta merkir, at tað í tann mun tað er ósamsvar millum persónsupplýsingarlógina og § 27 í fyrisitingarlógini, er tað fyrisitingarlógin sum víkir fyri persónsupplýsingarlógini.

§ 4 í persónsupplýsingarlógini ásetur, at persónsupplýsingarlógin víkir fyri ásetingum um viðgerð av persónupplýsingum í aðrari lóggávu, um ásetingarnar í aðrari lóggávu hava við sær, at tann skrásetti fær eina betri rættarstøðu viðvíkjandi viðgerð av persónupplýsingum. Henda áseting hevur ikki við sær, at niðurstøðan verður ein onnur. § 4 snýr seg yvirskipað um, hvørt tað er møguligt í serlóg at hava serligar ásetingar um viðgerð av persónupplýsingum, meðan tað enn er so, at almenna reguleringin av viðgerð av persónupplýsingum er í persónsupplýsingarlógini.

*Virkisøki fyri § 27 í fyrisitingarlógini*
At § 27 í fyrisitingarlógini víkir fyri persónsupplýsingarlógini hevur við sær, at § 27 einans er galdandi í teimum førum, tá viðgerðin er uttan fyri virkisøkið á persónsupplýsingarlógini. T.e. um talan ikki er um persónupplýsingar ella um viðgerðin av persónupplýsingum ikki er heilt ella lutvíst elektronisk og um persónsupplýsingarnar ikki eru ella verða settar í eina skrá. Hetta er t.d. um avrit verður tikið av einum skjali í einum "papír-máli" og verður sent við vanligum posti.

Av tí, at mesta viðgerðin í almennu fyrisitingini í dag fer fram elektroniskt, er sjálvstøðuga virkisøkið hjá § 27 smalt.

Tann lýsta rættarstøðan er tann sama sum í Danmark og er m.a. lýst í viðmerkingunum til donsku lógina um viðgerð av persónsupplýsingum frá 2000. M.a. av hesi orsøk varð § 28 í donsku fyrisitingarlógini, sum svarar til § 27 í føroysku fyrisitingarlógini, broytt í 2009 (lov nr. 503 frá 12. juni 2009 om ændring af forvaltningsloven og lov om behandling af personoplysninger) soleiðis, at § 28, stk. 1 í donsku lógini nú vísir til reglurnar í persónsupplýsingarlógini. Hetta ger rættarstøðuna greiðari.

*Serligar ásetingar í fyrisitingarlógini*

Umframt almennu ásetingina um víðarigeving av upplýsingum í § 27 eru serligar ásetingar í §§ 28 og 30 í fyrisitingarlógini um viðgerð av upplýsingum.

Í § 28 í fyrisitingarlógini er ein seráseting um savnan av upplýsingum í sambandi við mál, ið verða reist við umsókn, og í § 30 er serlig áseting um, nær ein fyrisitingarmyndugleiki hevur skyldu at geva upplýsingar víðari til ein annan myndugleika. Hesar serstøður eru ikki serliga reguleraðar í persónsupplýsingarlógini, og ásetingarnar víkja tí ikki fyri persónsupplýsingarlógini, men eru galdandi við síðuna av.

## 2. Innlit

*Ásetingar um innlit*

Allar tríggjar løgtingslógirnar – fyrisitingarlógin, lógin um innlit í fyrisitingina og persónsupplýsingarlógin – hava ásetingar um innlit. Tað kunnu tí stinga seg spurningar upp um, hvør løgtingslóg skal brúkast í hvørjum einstøkum føri.

*Ásetingar í persónsupplýsingarlógini*

§§ 18 og 19 í persónsupplýsingarlógini áseta reglur um ávikavist alment og egið innlit.

Sambært § 18 kann ein og hvør krevja at fáa at vita, hvørjar persónupplýsingar ein dátuábyrgdari viðger, og fáa upplýst m.a. navn og bústað dátuábyrgdarans og endamálið við viðgerðini.

§ 19 í persónsupplýsingarlógini gevur rætt til innlit í upplýsingar um ein sjálvan, sum verða viðgjørdar, umframt innlit í upplýsingar, sum geva skrásetta møguleika at røkja egin áhugamál. Hetta er t.d. upplýsing um navn og bústað hjá dátuábyrgdara, endamálið við viðgerðini og hvørjar upplýsingar verða viðgjørdar.

Ásetingarnar í persónsupplýsingarlógini geva skrásetta (§ 19), umframt einum og hvørjum (§ 18) rætt til innlit í *upplýsingar*, sum eru viðkomandi fyri viðgerð av persónupplýsingum. Eftir hesum ásetingum kunnu einstaklingar ikki krevja innlit i skjøl ella mál, sum eftir reglunum um innlit í lógini um innlit í fyrisitingina og fyrisitingarlógini.

Sambært § 5, stk. 1 í persónsupplýsingarlógini avmarkar lógin ikki innlit sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella sambært aðrari lóg um innlit í persónupplýsingar.

Henda áseting hevur við sær, at persónsupplýsingarlógin og tann verjan, sum løgtingslógin gevur tí einstaka, ikki avmarkar rættin til innlit eftir aðrari lóggávu. Hetta merkir, at metingin, sum verður gjørd í innlitsmálum – um verju av tí einstaka – ikki verður gjørd eftir persónsupplýsingarlógini, men eftir lógini, sum innlitsumbønin verður viðgjørt eftir. Tann verndin, sum persónsupplýsingarlógin gevur einstaklinginum er í ávísan mun endurspeglað í t.d. § 12 í lógini um innlit í fyrisitingina, sum ásetur, at rætturin til skjalainnlit ikki fevnir um upplýsingar um privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum.

Samstundis, sum persónsupplýsingarlógin ikki avmarkar innliti eftir aðrari lóggávu, er ásett í § 22, stk. 3, at frávik í rættinum til innlit eftir lógini kunnu gerast samsvarandi ásetingunum í lógini um alment innlit § 2, §§ 7-11 og § 14

§ 5, stk. 1 og § 22, stk. 3 merkja samanumtikið, at persónsupplýsingarlógin ikki avmarkar innliti eftir aðrari lóggávu, og at lógin samstundis ikki kann brúkast at fáa atgongd til upplýsingar, sum av røttum eru undantiknar innliti eftir lógini um alment innlit.

*Ásetingar í fyrisitingarlógini*

Fyrisitingarlógin gevur tí persóni, sum er partur í einum máli har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð, ávís rættindi. Hetta fyri at røtt avgerð verður tikin, og at einstaklingurin hevur møguleika at røkja síni áhugamál.

Sambært § 9 í fyrisitingarlógini kann tann, sum er partur í einum máli, har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð, krevja at verða gjørdur kunnigur við skjølini í málinum.

Innlit eftir fyrisitingarlógini er ikki avmarkað til upplýsingar um ein sjálvan, men er breitt galdandi fyri málið, sum avgerð er ella fer at verða tikin í. Hetta merkir, at viðkomandi partur kann fáa innlit í eisini persónupplýsingar um onnur um hesar upplýsingar eru partur av málinum. Innliti kann tó avmarkast eftir t.d. § 15, sum ásetur, at rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun, áhugin hjá partinum í at kunna nýta kunnleika til skjøl í málinum til at røkja sín tørv, má metast at eiga víkja fyri avgerandi umhugsni fyri viðkomandi sjálvum, ella øðrum privatum ella almennum áhugamálum.

*Ásetingar í løgtingslógini um innlit í fyrisitingina*
Sambært § 4, stk. 1 í løgtingslógini um innlit í fyrisitingina kann ein og hvør við ávísum undantøkum krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans.

Í mun til markamóti til persónsupplýsingarlógina er tað serliga § 4, stk. 2, sum er viðkomandi. Stk. 2 ásetur, at hann, hvørs persónligu viðurskifti eru umtalað í einum skjali, við ávísum undantøkum kann krevja at fáa høvi til, at gera seg kunnugan við upplýsingarnar. Hetta er tó ikki galdandi um t.d. umhugsni fyri honum sjálvum, ella øðrum, avgjørt talar ímóti hesum.

*Vegleiðing*
Sambært § 5, stk. 2 í persónsupplýsingarlógini er tað skylda dátuábyrgdarans av sínum eintingum at vegleiða tann, sum biður um innlit eftir persónsupplýsingarlógini, um onnur lóg heimilar innlit í fleiri upplýsingar enn persónsupplýsingarlógin.

Ofta vil tað verða so, at ein umbøn um innlit ikki nágreinar rættargrundarlagið, sum innlitsumbønin er grundað á.

Myndugleikin skal tá meta um, hvat rættargrundarlag gevur besta úrslitið fyri tann, sum hevur sett fram umbønina og – sum partur av vanligu vegleiðingarskylduni – vegleiða viðkomandi um hetta. Myndugleikin kann eisini taka avgerð eftir tí lógini, sum heimilar innlit í flestu upplýsingum.

Hetta kann hava við sær, at ein myndugleiki skal geva innlit eftir § 9 í fyrisitingarlógini ella § 4, stk. 2 í løgtingslógini um innlit í fyrisitingina, umframt at geva innlit í upplýsingarnar, sum skulu latast í sambandi við innlit eftir persónsupplýsingarlógini sambært § 19, stk. 1 og 2.

---

[i] Um sama evni sí m.a.:

- Løgtingsmál nr. 103/2000: Uppskot til løgtingslóg um viðgerð av persónupplýsingum.
- Fyrisitingarlóg, Lærubók, Onnur økta útgáva, Fróðskaparsetur Føroya 2012, s. 188ff.
- Uppskot til fyrisitingarlóg, Løgtingstíðindi 1992, s. 436ff.
- LFF nr. 147 af 9. december 1999 om forslag til lov um om behandling af personoplysninger.
- Betænkning nr. 1500 om udveksling af personoplysninger inden for den offentlige forvaltning, København 2008.
- Justitsministeriets vejledning af 12. november 2003 om offentlige myndigheders udveksling af personoplysninger som led i den koordinerede myndighedsindsats over for rockeres kriminalitet.